Løgmaður á vitjan í Bretlandi

-og stór sendinevnd úr Hetlandi kemur til Føroya at hitta løgmann oo.

Tá løgmaður Edmund Joensen í fjør hitti táverandi bretska uttanríkisráðharran í Keypmannahavn fyri at tosa um marknatrætuna millum londini fekk løgmaður innbjóðing frá Douglas Hurd um at koma til Bretlands at vitja.

Dagurin fyri hesi vitjan hevur eftir tí Sosialurin skilur, verið ásettur eina ella fleiri ferðir, men er vitjanin útsett.

Edmund Joensen, løgmaður sigur við Sosialin, at hann fer til Bretlands, tá høvi er tað rætta. Sjálvur heldi eg, at tað verður rætta høvið at fara avstað einaferð í hesum árinum.

Hann vísir á, at orsøkin til, at vitjan er útsett er tann, at árið í fjør var rættiliga "hektiskt" bæði hvat vitjanum og annars tí politiska lívinum viðvíkur.

Eitt av málunum, sum løgmaður fer at umrøða undir komandi vitjanini verður ósemjan um undirgrundarmarkið.

Vitjan úr Hetlandi

Seinast í hesum mánaðinum kemur ein sendinevnd úr Hetlandi á vitjan. Tað eru umboð fyri myndugleikarnar og vinnuna, sum koma hendavegin at tosa um framtíðar samstarv á oljuøkinum.

Í ferðalagnum verður fleiri av teimum mest týðandi politikarunum og embætismonnunum í Hetlandi.

Hetlendingar hava biðið um fund við løgmann at tosa um samstarv.

Tá Sosialurin var á oljuráðstevnu í Aberdeen í fjør segði ovasti leiðarin í Hetlandi fyri blaðnum at eitt samstarv millum Føroyar og Hetland kann vera sera gagnligt fyri báðar partar. Hetland hevur drúgvar royndir á oljuøkinum, sum kunnu koma Føroyum væl við. Eisini er útbúnaður í Hetlandi, eitt nú í Sullom Voe, sum føroyingar kunnu fáa nyttu av at brúka í eini komandi oljuvinnu.

Hetland ynskir at vera við í menningini av oljuprovinsini millum Føroyar og Hetland. Gongdin í Norðsjónum hevur verið tann, at minni olja nú verður flutt á goymslurnar í Sullom Voe og hetta hevur fingið klokkurnar at ringja hjá politikarunum, sum bera ótta fyri stórum arbeiðsloysi og afturgongd, um ikki olja kann koma frá nýggju leiðunum. Oljan í Norðsjónum verður nú flutt um rørleiðing til Skotlands ella við smærri tangaskipum frá teigunum beinleiðis til raffinaríini í Europa.

Hetlendingar halda tað vera sannlíkt, at olja er í føroysku undirgrundini og teir halda, at føroyingar kundu fingið lønandi vinnu við at brúka fasilitetirnar á eitt nú Sullom Voe.

jan

Fjøruti stak góð ár

- Arbeiðið er framvegis líka spennandi, sigur Marita Arge Magnussen, sum nú hevur arbeitt í 40 ár sum laborantur á Landssjúkrahúsinum

Í januar 1956 kom Marita Arge Magnussen heim úr Danmark nýútbúgving sum sjúkrahúslaborantur at arbeiða á Landssjúkrahúsinum, og hevur hon arbeitt síðan.

Tá var útbúgving enn bara eitt ár, men nakað seinni varð útbúgvingin løgd í fasta legu og longd. Tær við tí stuttu útbúgvingini, fingu tó sína góðkenda.

Vóru bara tvær

- Í fyrstuni arbeiddi bara ein onnur umframt meg á laboratoriinum, tí arbeiðið tá var ikki so umfatandi. Fakið er so nýtt, sum tað er nú. Vit gjørdu royndir av blóði og landi. Tól vóru eingi sum nú. Okkara mest framkomna arbeiðsamboð var sjónevkan.

Eitt kvinnuyrki

Nú gera laborantarnir so nógv annað arbeiði og hava nógv nýggj tól at gera sínar kanningar við. Teir eru 23 í tali á Landssjúkrahúsinum, harav ein maður. Tað er ikki Føroyum, at fáir menn velja hetta yrkið. Í Danmark eru 8% av laborantunum menn, og helvtin av hesum situr í leiðandi størvum.

Øll hesi 40 árini, Marita hevur arbeitt á Landssjúkrahúsinum hevur hon bara verið frá í tríggjar mánaðir, og hon hevur ongantíð verið troytt av sínum arbeiði. Síðan seinast í 60-árunum verið leiðari á laboratoriinum.

Hetta hava verið 40 stak góð ár. Øll árini eru komnar nýggjar avbjóðingar, og tær hava ongantíð verið so nógvar sum nú, tí tað hendir sera nógv nýtt á økinum alla tíðina.

Sjálvar ábyrgdina

Laboratoriið fylgir væl við og er ikki aftan fyri tey í grannalondunum. Og laborantarnir duga minst líka nógv sum starvsfelagar teirra í øðrum londum, tí tær gera meira arbeiði her og hava ábyrgdina av tí sjálvar.

Tað er gott at skula brúka sínar egnu kreftir og hava ábyrgdina sjálv, í staðin fyri um onkur raddi yvir okkum.

Laborantarnir fara javnan á skeið fyri at kunna seg við alt tað nýggja, sum kemur fram.

Gott fólk

Vit læra eisini nógv, tá tað koma ungir nýútbúnir laborantar at arbeiða, tí tær koma við nógvum nýggjum hugskotum, sigur Marita, sum heldur, at laboratoriið er so væl statt, tí har hava verið og eru nógvir sera dugnaligir laborantar.

Aðrir laborantar enn Marita hava støðast leingi á landssjúkrahúsinum. Ein hevur verið har í 35 ár, ein umleið 30 ár, og tvær hava 25 ára starvsdag í summar.

- Og eg havi ongar ætlanir um at gevast enn, tí mær dámar arbeiðið framvegis líka væl, sigur Marita.

randi

Startskotið til føroyska luttøku í komandi oljuvinnu!

Føroyingar vilja vera við í Lopransboring

Fyri fyrstu ferð kunnu føroyingar luttaka í einum arbeiði, sum hevur beinleiðis við eina komandi oljuvinnu í Føroyum at gera. Talan er um Lopransboringina í mai í ár. Fundurð var í Havn í gjár.

Í gjár var fundur í Havn um komandi boringina í Lopra. Føroyingar eru sera hugaðir fyri at vera við í arbeiðinum í Lopra í mai í ár og hava feløg og einstaklingar heitt á danska felagið Dopas, sum stendur fyri útinnan av verkætlanini um at bera so í bandi, at so nógv sum til ber av arbeiðinum verður gjørt av føroyingum.

Danska felagið er sera hugað fyri at gera eftir hesum ynski og hevur tí stevnt feløgum og til fundar í Havn. Fundurin varð hildin á Hotel Føroyum í gjár.

Tað er serstakliga Føroya Oljuídnaður, sum hevur roynt at birta uppundir, at arbeiði í sambandi við eina komandi oljuvinnu, verða gjørd av føroyingum í tann mun hetta er gjørligt.

Lopransboringin er sum so startskotið til føroyska luttøku í eini møguligari oljuvinnu. Tí hetta er fyrstu ferð, at ein størri verkætlan verður sett í gongd og har føroyingar kunnu koma inn í myndina. Tað er sjálvandi avmarkað, tí tað snýr seg í stóran mun um, at líðug útgerð kemur til landið, at serfrøðingar innan boriarbeiði skulu til verka ostr. Men her verður tó nógv, sum føroyskar fyritøkur kunnu vera við í, eitt nú flutningur, arbeiði og mangt annað.

Umleið 20 mans koma at arbeiða í Lopra í einar tveir mánaðir. Roknað verður við, at einir fýra føroyingar kunnu fáa arbeiði av hesum.

Boringin í Lopra fer at kosta einar 30 mill. kr. Hon skal geva okkum meiri vitan um, hvat er undir basaltinum. Tilsamans 18 oljufeløg hava boðið sær til at fíggja projektið.

Arbeiðið í Lopra fer so eisini at skapa nakað av virksemi í tænastuvinnuni í oynni, her m.a. hjá gistingarhúsum.

jan

Blindastovnur Føroya

hevur opið mándag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288